VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sirm ella mjørki. Hitin millum 7 og 10 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

Annika syngur fyri børnunum hjá børnunum

Nú eru børnini vaksin. Tí kemur nýggja barnafløgan hjá Anniku Hoydal út júst 30 ár eftir at fyrra fløgan, »Til børn og vaksin frá Anniku« kom í 1975

FLØGUÚTGÁVA
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Eg havi brotið nøsina!

Hetta var tað fyrsta Annika Hoydal segði, tá vit hittu hana á loftinum á Café Natúr í morgun, har hon legði fram nýggju fløgu sína, »Til børnini hjá børnunum«.

Og so fingu vit søguna.

Ilsligt veður var sunnudagin. Tí beyð bróðir Anniku, Gunnar, sær til at koyra hana eitt ørindi, men í tí hon fór úr bilinum, misti hon hurðina, sum smekkaði beint á nøsina sum brotnaði.

Annika endaði á sjúkrahúsinum, har nøsin varð bend upp á pláss aftur. Men hon hevur fingið at vita frá læknanum, at hon kann syngja, og tað er tað sum hevði størstan týdning, tí leygardagin fer hon at hava tvær konsertir, eina á Majarínum – eina familjukonsert seinnapartin kl 15 og eina fyri vaksin á Rex, har tað verða sangir frá Harkalið-tíðini, ið fyri tað mesta verða at hoyra.

Tann næsta barnafløgan kemur út, tá eg fylli 90, sigur Annika Hoydal skemtandi. Leygardagin fyllir Annika 60 ár
Mynd: Jens Kristian Vang

Á nýggju fløguni hjá Anniku eru 26 sangir. Annika sigur sjálv, at hetta er ein fløga við gomlum og nýggjum songum fyri børn - og kanska eisini fyri mammur og pápar teirra. Talan er um nógvan nýggjan tónleik, har Annika hevur gjørt løg og orð. Eisini er okkurt skjaldur og so ein sangur um føroysku stavirnar – har Annika við beroddum huga á henda hátt vil læra børnini stavirnar við sangi. Tveir av sangunum hava verið á útgávum fyrr.

Hetta er 14. útgávan, sum Annika Hoydal er við á. Men sjálvandi er tað fyrra barnaplátan, sum rennir okkum í huga, sum hevði heitið: »Til børn og vaksin frá Anniku«. Tað eru júst 30 ár síðani hendan útgávan kom, og tí heldur Annika, at tað er so nátúrligt, at kalla hesa »Til børnini hjá børnunum«, tí nú eru børnini vorðin vaksin!

Tað er aftur hesaferð, Ian McCalman, sum hevur lagt alla útgávuna til rættis í studio í Skotlandi.

Tað var ikki sum í 1975, tá vit tóku fløguna upp undir eini dýnu í einum kamari heima hjá foredlrunum hjá Iani í Skotlandi, sigur Annika líkasum fyri at samanbera tøknina tá og nú. Men hon heldur kortini, at tann plátan framvegis stendur seg væl, havandi í huga privitivu umstøðurnar.

Tekningarnar á fløgu, fløguhúsa og tekningar í sangeftirnum, hevur Ránnvá, abbadóttir beiggja Anniku, gjørt.

Annika er abbasysti Rannvá, sum hevur prýtt fløguhúsan og sangeftir, sum fylgir við fløguni. Abbi hennara, Gunnar, hevur altíð ein fingur við í spælinum í tónleikinum hjá Anniku
Mynd: Jens Kristian Vang

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-10
Nuuk	-4
Qaqortoq	-1
Ammassalik	0
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-3
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	12
Lerwick	12
Aberdeen	14
London	18
Tromsø	7
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	10
Keypmannah.	12
Helsinki	6
Moskva	2
Berlin	14
Warzawa	6
Kiev	2
Bukarest	3
Paris	22
Madrid	20
Róm	21
Malorca	26
Athen	15
Malta	23
Tunis	27
Beijing	19
New Dehli	28
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	--
New York	18
Miami	25
Los Angeles	20
Meksikobýur	18
Panama	--
La Paz	17
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	17

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1019 hPa. millum Íslands og Føroya fer spakuliga í landsynning og mennist. Eitt lágtrýst, 990 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer spakuliga eystureftir.



Í dag:
Hátrýstið við Hetland fer suðureftir. Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygardagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 30/10 kl. 06^{00}– 31/10. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 23,0 mm – mált frá 30/10 kl. 06^{00}– 31/10 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í november: 213,5 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

10. november Mánin næstur jørðini
16. november Fullmáni
23. november Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
17. Nov.	07.10	19.37	06.10	18.37	06.25	18.52	09.10	21.37	10.10	22.37	05.25	17.52	04.25	16.52	07.25	19.52	08.25	20.52	06.55	19.22	08.10	20.37
18. Nov.	08.04	20.30	07.04	19.30	07.19	19.45	10.04	22.30	11.04	23.30	06.19	18.45	05.19	17.45	08.19	20.45	09.19	21.45	07.49	20.15	09.04	21.30
19. Nov.	08.57	21.23	07.57	20.23	08.12	20.38	10.57	23.23	11.57	-	07.12	19.38	06.12	18.38	09.12	21.38	10.12	22.38	08.42	21.08	09.57	22.23
20. Nov.	09.49	22.13	08.49	21.13	09.04	21.28	11.49	-	00.23	12.49	08.04	20.28	07.04	19.28	10.04	22.28	11.04	23.28	09.34	21.58	10.49	23.13
21. Nov.	10.38	23.00	09.38	22.00	09.53	22.15	00.13	12.38	01.13	13.38	08.53	21.15	07.53	20.15	10.53	23.15	11.53	-	10.23	22.45	11.38	-

5 707265 100043 >